# Tann tigandi kollveltingin

**3. partur**



VINNUBÓKMENTIR
*Finnbogi Ísakson*

Munurin millum rík og fátæk lond og millum rík og fátæk fólk í londunum er vaksin tey seinastu 20-25 árini, skrivar Noreena Hertz í sínari bók. Sum dømi nevnir hon, at 13,7% av amerikanska fólkinum – 36,5 miljónir – liva í fátækradømi, meðan 1% av fólkinum eigur 40% av landsins ríkidømi. Fyri 25 árum síðani vóru tað 13% av fólkinum, sum áttu tey 40 prosentini. Hetta merkir, at 13.000 tey ríkastu húsarhaldini í Amerika hava næstan líka nógv í inntøku sum tær fátækastu 20 miljónirnar húsarhaldini. Støðan er ikki nógv mætari í fleiri øðrum londum, sum teljast millum tey mest framkomnu í heiminum.

Tey, sum taka undir við globalu kapitalismuni, siga, at hetta er ein skiftisstøða, at skipanini bagir einki, men at ov stutt tíð er fráliðin síðani umskipanina. Vælstandurin fer at enda at røkka øll. Kanska viðganga tey, at skipanin hevur íborið miskunnarloysi, men gera ta niðurstøðu, at fyri samfelagið sum heild er prísurin fyri nýliberalismuna verdur at gjalda. Men hvør skal taka sær av teimum, sum tapa uppá kapitalismuna, meðan vit bíða eftir, at øll skula fáa gagn av henni?

Tað tykist ikki, sum at staturin fer at gera tað. Uppfatanin hjá Reagan og Thatcher hevur stóra undirtøku – uttan mun til flokslit. George Bush hevur boðað frá fleiri tiltøkum, sum skula flyta ta sosialu ábyrgdina av borgarunum frá statinum til hin einstaka. Eitt er, at fólk skula syrgja fyri síni egnu pensjón við at seta pening í partabrøv. Trúarfeløg og sjálvbodnir felagsskapir fara meir og meir at fáa ábyrgdina av at nøkta sosiala tørvin. Men myndugleikarnir høvdu kanska ikki kunnað gjørt so nógv við tey sosialu viðurskiftini, hóast teir høvdu viljað. Sum fyrrverandi stjórin í týska tjóðbankanum Hans Tietmeyer segði: *"Politikararnir muga skilja, at nú verða teir stýrdir av fíggjarmarknaðunum og ikki sum fyrr av almennum kjaki."* Heldur fíggjarmarknaðurin, at útbygging av almenna heilsuverkinum ella skúlaverkinum gerast ov dýr, svarar hann aftur við hægri rentustøði ella fallandi valuta. Á henda hátt bjóðar fíggjarmarknaðurin sjálvari sjálvstøðu ríkisins av. Tann globala kapitalisman dikterar meir og meir, hvat stjórnirnar kunna og ikki kunna gera.

Fleirlanda fyritøkurnar eru vitandi um tað vald, tær hava. Tær krevja alla tíðina betri treytir. Tær vilja ikki byggja verksmiðjur í londum, har lønir og skattir eru ov høg, krøvini ov stór, og studningur og lán ikki standa í boði, ella taka tær seg úr slíkum londum. Meir og meir ráða tær fyritøkurnar, sum hava mest at siga víða um heim. Politikararnir kunna ikki annað enn mutra stórfyritøkurnar fyri at fáa tær at lata vera við at flyta av landinum, men teir fáa onga trygd fyri, at fyritøkurnar ikki verða fluttar kortini, tá nakað er fráliðið. Ríkismyndugleikarnir gerast alsamt máttleysari mótvegis teimum risastóru fyritøkunum, sum fóru um tjóðarmørk fyri mongum árum síðani.

## Skatturin lækkaði

Skattlegging hevur verið ein grundleggjandi rættur hjá statinum. Skatturin kann nýtast til at rætta sosialan og fíggjarligan ójavna. Men stórfyritøkurnar trýsta eisini skattin niður. Tað er ein spurningur, hvussu leingi *eitt* land kann hava størri skattatrýst enn eitt *annað* land. Avleiðingin kann skjótt vera, at fyritøkur í hópatali flyta burtur. Írland er ímóti, at skattastøðið í ES verður javnað, tí Írland hevur lægri skattaprosent enn hini londini og hevur tí lættari við at draga kapital til sín. Skattingin av stórfyritøkum lækkar um allan heim: Td lækkaði skattastøðið á amerikanskum dótturfeløgum í menningarlondum úr 54% niður í 28% frá 1983 til 1996. Í ídnaðarlondunum lækkaði skattastøðið hjá stórfyritøkunum úr 50% niður um 35% frá 1980-unum til 2001.

Í Týsklandi er felagaskatturin lækkaður 50% 20 tey seinastu árini, hóast fyritøkurnar hava økt vinningin 90%. Í 1999 ætlaði fíggjarmálaráðharrin Oskar Lafontaine at hækka felagaskattin, men ein bólkur av fyritøkum forðaði hesum. Harímillum vóru fleiri bankar og týska orku- og ídnaðarfelagið. Fyritøkurnar hóttu við at flyta íløgurnar og verksmiðjurnar burtur í onnur lond, um politikkurin hjá myndugleikunum ikki hóvaði teimum. Hóttanin hjá fyritøkunum mundi gera sítt til, at Lafontaine noyddist frá sum fíggjarmálaráðharri. Tá hann fór, segði hann: *"Enn ber ikki til at selja hjartað á børsinum."* Næsti meðarbeiðarin hjá kanslaranum svaraði: *"Nú fer tað at vera øðrvísi. Vit muga stevna aðra leið. Raðfestingarnar hjá Gerhard Schröder verða øðrvísi, tað er eyðsæð."*

Fáa mánaðir seinni lækkaði Týskland felagaskattin, men longu í 2003 vildi vinnulívið vera við, at eftirlitið við vinnuni var ov strangt, og at skatturin var ov høgur. Tað varð avdúkað, at sjálvt Deutsche Bank í loyndum umhugsaði at flyta úr Týsklandi.

Altjóða vinnulívið heldur seg ikki einans til felagaskattin, men leggur eisini trýst á myndugleikarnar at fáa teir at lækka persónsskattin. Fleiri svenskar fyritøkur, teirra millum Ericsson, hava hótt við at flyta av landinum, tí tær siga tann høga inntøkuskattin gera tað trupult at fáa arbeiðsmegi við góðum førleika. Ericsson flutti eisini fleiri deildir av landinum og læt stóra skrivstovu upp í Lond~on í 1999.

Í 21. øld ráða stórfyritøkurnar í stóran mun fyri, hvussu nógvan – ella lítlan – skatt tær vilja gjalda og hvar. Internetið ger tað eftir øllum at døma truplari hjá myndugleikunum at fáa fatur í skattinum. Ein fyritøka kann nú stovnast í einum skattaparadísi, hava framleiðsluhallirnar eina aðrastaðni - og kanska fáa studning – og skipa søluna av einum hugsaðum stað, hagar myndugleikarnir ikki røkka. Sum dømi kann nevnast, at bankin BCCI hevur, fyri at sleppa undan skatti, dugað at borið so í bandi, at hann er ikki skrásettur nakrastaðni.

Tá tað ikki ber til at fáa hendur á tí skatti, sum stórfyritøkurnar áttu at goldið, kann tað í ringasta føri hava við sær, at staturin verður ikki førur fyri at nøkta tørvin hjá borgarunum á almennum tænastum. Í USA fullu samveldisútreiðslurnar til vegir, skúlar og universitet í 1990-unum, máldar sum partur av bruttotjóðarframleiðsluni, sjálvt undir einum demokratiskum forseta.

Í Bretlandi tordu hvørki teir konservativu ella Arbeiðaraflokkurin at fara til val uppá skattahækkingar í 2001. Teir stúra fyri, at tey ríku rætt og slætt rýma av landinum, gerst skattabyrðan ov stór. Ríkir fransmenn flyta yvir um Ermasund til Bretlands, har mesti skatturin er 35% móti 47% í Fraklandi.



*Noreena Hertz skrivar, at tá hon var í Russlandi frá 1991-93, varð hon sannførd um, at tær amerikansku uttanríkispolitisku avgerðirnar vóru grundaðar á ta fatan, at amerikanska skipanin og hennara virði verða best vard við einari globalari skipan, grundað á tørvin hjá privata kapitalinum, íroknað ognarrættin og fría atgongd til marknaðin.*

## Vælferðartilboð til vinnuna

Myndugleikarnir eru eisini endaðir í einari støðu, har teir veita einum kunda, sum ikki hevur tann stóra tørvin, "vælferð" – vinnuni. USA veitir vinnuni 75 miljardir dollarar í beinleiðis studningi árliga, og tað eru teir fátæku statirnir, har munurin millum rík og fátæk er størstur, sum bjóða mest. Við serligum tiltøkum læt Ohio vinnuna sleppa undan at gjalda skatt av ognum fyri 2,1 miljardir dollarar í 1996. Borden Chemicals er 10 tey seinastu árini sloppið undan at gjalda 15 mió. dollarar í skatti, tí myndugleikarnir í Lousiana settu serlig vælferðartiltøk í verk fyri stórfyritøkur. Henda sama fyritøka oysti so nógv eitur út í luftina í 1996, -97 og –98, at allir vegir í nánd av verksmiðjuni máttu steingjast. Líknandi tiltøk til frama fyri vinnuna eru framd víða um heim.

Tá myndugleikarnir veita fyritøkum slík vælferðartilboð og lata seg ávirka av hóttanum um, at annars verða tær fluttar, so broytast spælireglurnar, uttan at vit varnast tað. Tá verður handilsstrategiin vend móti politisku skipanini. Kappingarfyrimunir verða ikki longur einans fingnir við lágum framleiðslukostnaði, betri tænastu ella fjølbroyttum tilboðum, men eisini við politiskari strategi hjá fyritøkunum og lobbyvirksemi. Aftur eru tað teir vanligu borgararnir, sum tapa. Peningur, sum verður brúktur sum studningur til vinnuna, er peningur, sum ikki er tøkur til almennar tænastur.

Í 1999 veittu amerikanskir myndugleikar vinnuni 1,7 miljardir dollarar í skattaavdrátti. Samstundis er amerikanski skúlin so illa fyri, at í altjóða kanningum eru næmingarnir millum teir vánaligastu í heiminum, tá tað kemur til matematikk.

Fyritøkurnar taka ofta ímóti pengum og flyta so stutt eftir til annað land, har treytirnar eru uppaftur betri. Í Týsklandi skula fyritøkurnar viðgera slíkar spurningar við arbeiðsfólkið. Í USA og Bretlandi er tað ikki neyðugt.

Senatorurin Charles Horn úr Ohio hevur sagt:

*"Vit vita, at fyritøkurnar manipulera, men tað er natúran í vinnuni at jagstra hvønn einasta dollara, sum fatur kann fáast á. Stílið tí ikki atfinningarnar til vinnuna, men myndugleikarnar. Hetta er dárskapurin hjá myndugleikunum."*

Myndugleikarnir eru sostatt fangaðir millum skins og hold. Teir vilja ikki váða at missa stuðul frá veljarunum ella fyritøkunum við at hækka skattin og eru ikki førir fyri at hækka útreiðslurnar av ótta fyri marknaðinum. Hvørjar verða avleiðingarnar? Størri ójavni? Ein heimur, har tey fátæku verða lítilsgjørd uppaftur meira, og tey ríku verða uppaftur ríkari? Ein heimur, har tað týdningarmesta markaskjalið gongur millum tey, sum eru innanfyri, og hini, sum eru uttan fyri eina al-

*Framhald á næstu síðu*